# BILRADIO

Aktuel biltíðindi við Maggi Gunnarsson

## Bilradio á Rás2

leygardagin kl. 13 (e)

Vitjað verður hjá Sp/f Kaj Andreasen & Co. í Hoyvík, har samrøða er við Bergur Andreasen. Saman við Heðini Weihe, sølumanni hjá Auto Service, verður nýggi Opel Meriva royndarkoyrdur.

Jógvan Ingvard Olsen fortelur um tíðina áðrenn koyrivegur kom til Toftir og um fyrstu bilarnar har.



Jógvan Ingvard Olsen

# Leys størv í Tórshavnar kommunu

## SSP-samskipari (endurlýsing)

Á sosialu deild kommununnar er eitt fulltíðarstarv sum SSP-samskipari til barnaverndartænastuna leyst at søkja.

SSP er ein tvørfaklig samstarvsskipan millum myndugleikar og stovnar, ið arbeiða við ella hava samband við børn og ung. Yvirskipað er endamálið at fyribyrgja kriminaliteti og skaðandi atburði millum børn og ung.

**Arbeiðsøki**
SSP-samskiparin hevur lyklaleiklut í øllum SSP-arbeiðinum í kommununi, sum er býtt í tríggjar økisbólkar. Arbeiðsuppgávurnar eru fjølbroyttar og fevna m.a. um umsiting av økisbólkunum, at samskipa atgerðir, ið setast skulu í verk, og at fylgja hesum upp.

SSP-samskiparin virkar í tøttum samstarvi við hini starvsfólkini á deildini og aðrar viðkomandi samstarvspartnarar. Eisini kemur samskiparin í ávísan mun at arbeiða við barnaverndarmálum.

**Vit bjóða**
- eitt áhugavert og avbjóðandi starv bæði fakliga og persónliga
- møguleika fyri at menna teg fakliga
- eina vælvirkandi deild, har strembað verður eftir, at arbeiðið verður gjørt á einum fakliga høgum støði

Sosiala deild er partur av trivnaðarfyrisitingini og umsitur tey málsøkir, sum sambært galdandi lóggávu eru løgd til kommununa at umsita.

SSP-samskiparin skal verða útbúgvin sosialráðgevi.

**Løn og setanarviðurskifti**
Lønin er sambært sáttmála millum Starvsmannafelagið og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

**Umsókn**
Umsóknir við avriti av prógvum og møguligum viðmælum skulu vera hjá Tórshavnar kommunu, Postrúm 32, 110 Tórshavn, í seinasta lagi mánadagin 9. august 2010. Merkið umsóknina „SSP-samskipari".

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Eyðun Jensen, deildarleiðara, telefon 302010.

## Pedagogur

Vegna Býlingshúsið í Norðasta verður søkt eftir einum pedagogi at arbeiða 30-32 tímar um vikuna at byrja 9. august 2010 ella eftir nærri avtalu. Um pedagogur ikki søkir, verður hjálparfólk sett í tíðaravmarkað starv.

**Setunarviðurskifti**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

**Umsókn**
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir skulu vera Býlingshúsinum Norðasta Horn, Granagøta 5, 100 Tórshavn, í seinasta lagi mánadagin 2. august 2010.

**Meira fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Óla Midjord, stovnsleiðara, tlf. 210906, ella við at hyggja inn á heimasíðuna www.123hjemmeside.dk/nordastahorn

## Pedagogur

Tórshavnar kommuna søkir vegna Margarinfabrikkina eftir einum pedagogi at arbeiða 25 tímar um vikuna at byrja 15. august 2010 ella eftir nærri avtalu.

Margarinfabrikkin er eitt virkishús fyri børn og ung við einum starvsfólkabólki við 5 pedagogum og 2 hjálparfólk. Supervisón er ein partur av fakligu menningini.

Arbeiðstíðinar fevna um seinnapartars- og kvøldvaktir og í vikuskiftinum.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett sambært sáttmála við Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Boga Andreasen, leiðara, tlf. 213217 ella við at hyggja á www.margarinfabrikkin.fo.

**Umsókn**
saman við viðmælum, upplýsingum um útbúgving og royndum skal vera Tórshavnar kommunu, postrúm 32, 110 Tórshavn, í seinasta mánadagin 2. august 2010.

www.torshavn.fo

TÓRSHAVNAR KOMMUNA